## Fimleikaálmanakki

Havnar Fimleikafelag gevur út álmanakka fyri 2008. Í álmanakkanum er stórur dentur lagdur á myndirnar, har fimleikarar síggjast í kappingum av ymsum slag. Endamálið við álmanakkanum eru tvinni. Annað er, at vísa hvussu flottur fimleikur er. Og hitt, at fáa pening til vega til elstu kappingarliðini hjá felagnum. Myndir og layout hevur Hannis P. Wardum staðið fyri og Joan Petersen hevur verið samskipari. Álmanakkin kostar 100 kr. og er til sølu í bókabúðunum, eins og limir hjá Fimleikafelagnum fara at selja hann.




## Novembur góður hjá flogvøllinum

Í novembur mánaði ferðaðust 14.974 fólk um flogvøllin, og tað er 19,4 prosent fleiri enn í sama mánaði í fjør. Hendan mánaðin hevur vøkstur verið á farleiðunum til Danmarkar, Íslands og Stórabretland, meðan afturgongd hevur verið á farleiðunum til Noregs. Nakað av frálandaferðslu hevur somuleiðis verið í novembur. Higartil í ár eru tilsamans 204.911 fólk farin og komin um flogvøllin. Hetta er 4,7% meiri enn sama tíðarskeið í fjør, tá talið var 195.627. Higartil í ár eru tilsaman 5.159 flogfør komin og farin um flogvøllin í Vágum. Tað er 16,3% færri enn sama tíðarskeiði í fjør, sigur Vága Floghavn á heimasíðu síni.

# Sparingar seta ferðslutrygdina í vanda

**Landsverk rópar nú varskó. Skal trygdin á landsvegunum ikki koma í vanda í nærmastu framtíð, er tað alneyðugt, at meiri peningur verður settur av til at halda vegirnar fyri**

FERÐSLUTRYGD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Skal ferðslutrygdin á landsvegunum ikki koma í vanda í nærmastu framtíð, er tað neyðugt at meiri peningur verður settur av til at halda vegirnar fyri.

Tað staðfestir Landsverk í eini frágreiðing til fíggjarnevndina hjá Løgtinginum, nú hon er í ferð við at viðgera fíggjarlógina fyri næsta ár. Stovnurin rópar nú varskó, tí ikki nóg nógvur peningur er at halda vegir, tunlar og brýr fyri. Landsverk er farið undir at skráseta og kanna vegir, tunlar og brýr.

- Fyribils niðurstøðan er, at tað er alneyðugt at gera rættuliga stórar ábøtur, stendur í frágreiðingini til fíggjarnevndina.

Samstundis staðfestir Landsverk eisini, at tann bráðneyðugi tørvurin er at fáa einar 10 milliónir um árið tey næstu árini.

Landsverk sigur, at játtanin til at halda landsvegirnar fyri, hevur at kalla staðið í stað síðani miðskeiðis í nítiárunum. Hinvegin eru slit, kostnaðarstøðið og útreiðslur annars, munandi hækkað.

- Hetta viðførir, at í dag er játtanin til at halda vegirnar eini 58% minni, enn hon var í 90-unum, tá játtanin eftir kreppuna var serliga lág.

- Tí er alneyðugt, at peningur verður játtaðar til at halda vegirnar fyri tey næstu árini, skal trygdin ikki koma í vanda, skrivar Landsverk til fíggjarnevndina.



*Talvan vísir, at tilsamans er játtanin til Landsverk í 2007 bara 58% av tí, hon átti at verið, um hon annars hevði fylgt fíggjarlógina síðani 1996 og tá ið lagt verður upp fyri, hvussu nógv meiri vegirnir verða slitnir av øktari øktari ferðslu og øktari vegalongd. Prísvøksturin í tíðarskeiðnum er settur til 1,5%*

# Landið forsømir vegir og brýr



*Í næstum verður farið undir at umvæla brúnna um Sundalagið*

*Savnsmynd*

**Tað er fleiri ferðir so kostnaðarmikið at umvæla ferðslukervið, sum at viðlíkahalda tað, sigur leiðslan á Landsverk, ið hevur á leið 50 mió. krónur at viðlíkahalda vega- og tunnilskervið fyri. Hetta eru minst 10 mió. krónur ov lítið, staðfestir Oyvindur Brimnes**

FERÐSLUTRYGD
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Støðan er ikki beinleiðis hættislig, sum er, men kann gerast tað upp á sikt, um ikki fleiri pengar verða settar á tær komandi fíggjarlógirnar til at viðlíkahalda føroyska ferðslukervið fyri. Hetta sigur stjórin á Landsverk í eini viðmerking til frágreiðingina, sum stovnurin hevur latið fíggjarnevndini hjá Løgtinginum.

- Vit eru í eini sera óheppnari støðu, og tað er hetta, vit royna at vísa á í frágreiðingini. Tær 50 mió. krónurnar til viðlíkahald til vegir og brýr eru 10 mió. krónur ov lítið, sigur Oyvindur Brimnes, stjóri á Lansverk.

Serliga eru tað tær á leið 300 brúgvarnar í Føroyum, ið verða forsømdar.

- Tað er ein royndur lutur, at tað er bæði betri og bíligari at viðlíkahalda ferðslukervið, enn at umvæla tað, tá skaðin er hendur. Vit kunnu samanbera tað við at koyra áravís í einum bili og ongantíð ella sjáldan skifta olju. Fyrr ella seinni gongur motorurin fyri, sigur Oyvindur Brimnes. Tað er henda støðan, sum vega- og tunnilskervið er í, vísir stjórin á Landsverk á.

- Viðlíkahaldið snýr seg ikki bert um at asfaltering á vegum. Tað, sum er nógv álvarsligari, er, at brúgvarnar ikki verða viðlíkahildnar. Tí mæla vit til, at ístaðin fyri at játta so nógv til nýíløgur í ferðslukervið, eigur játtanin til viðlíkahald at hækka, sigur Oyvindur Brimnes.

Hann leggur dent á, at brúgvarnar ikki eru í so vánaligum standi, at vandi er fyri, at onkur kann brotna her og nú. Men heldur hendan gongdin fram, kunnu vit koma í ta støðuna.

- Vit hava bráðfengis tørv á at fáa eina hægri játtan til viðlíkahald. Sæð í mun til vøksturin í akførum og ferðslutølunum, sum er tvífaldað síðani 1996, so hevur játtanin til viðlíkahald so at siga staðið í stað øll hesi árini, sigur Oyvindur Brimnes.

Stjórin á Landsverk vísir eisini á økta talið av tunlum, ið kosta fýra ferðir so nógv at viðlíkahalda fyri hvønn kilometur, sum vegirnir gera. Harafturat verður ljós lagt í teir flestu tunlarnar, ið ikki einans krevur viðlíkahald, men eisini drenar viðlíkahaldsjáttanina, tí elnýtslan skal gjaldast av somu pengum.

Ein annar trupulleiki, sum Landsverk stríðist við, eru smáu játtanirnar til umvælingar av serliga tunlum. Ístaðin fyri at gera alt um eina leið, skal riggast til og riggast av fleiri ferðir til sama arbeiði, tí játtanirar ikki strekkjur í einum ávísum fíggjarári. Av tí sama gerst samlaða umvælingin munandi dýrari, enn um alt varð gjørt út í eitt koyr. Eitt dømi er Norðskálatunnilin, har umvæling og ljósinnlegging hevur tikið fleiri ár.

Annars verður í næstum farið undir at umvæla longstu brúgv í landinum, brúnna um Streymin. Søgurnar um, at brúgvin skal vera í so vánaligum standi, at tveir fulllastaðir trailarar ikki mugu møtast á brúnni, er reinur heilaspuni, sigur stjórin í Landsverk.

- Brúgvin er dimensioneraðtil fleiri ferðir ta vekt, sum kann vera á henni samstundis, so har er ongin vandi á ferð, leggur Oyvindur Brimnes dent á.



*Stjórin í Landsverk, Oyvindur Brimnes, mælir til at játta meiri pening til viðlíkahald og heldur spara upp á íløgurnar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*